**10 fl. Skúlin á Ziskatrøð**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 10/2010: Uppskot til samtyktar um at gera tað lættari hjá almennum stjórum at siga fólki úr starvi**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Ungdómstingið tekur undir við, at landsstýrið ger neyðugar lógarbroytingar og setir tiltøk í verk fyri at gera tað lættari hjá almennum stjórum at siga fólki, ið arbeiða undir teimum, úr starvi.

**Viðmerkingar**
Seinastu árini hava víst, at tað er nærum ógjørligt hjá alment settum stjórum at koyra fólk, ið arbeiða undir teimum, úr starvi. Vit hava sæð tað í Kringvarpi Føroya, Strandfaraskipum landsins o.s.fr.

Hetta lógaruppskot kundi spart landinum nógvar pengar, givið stjórum heimild at røkja sítt starv til fulnar (teir fáa jú boð um at spara viðhvørt), og at starvið hjá alment løntum fólki ikki skal vera so nógv tryggari enn hjá teimum í privatu vinnuni - hetta er jú at gera mun á fólki.

Fyri at sleppa undan slíkum óhepnum støðum, meta vit tískil, at tað er í tøkum tíma, at landsstýrið saman við Fíggjarmálaráðnum tekur neyðug stig til broyta hesa mannagongd.

**Á Løgtingi, tann 8. februar 2010**

Sára Petersen Høgni Olsen

Anfinn Kallsberg Karin Simona Klein